# Nøvn




# Jan Müller 60 ár

Í morgin, leygardagin 2. apríl, verður Jan Eiden Müller 60 ár. Jan hevur í 40 ár verið partur av føroyska fjølmiðlaheiminum, og frá 1978 var hann tann fremsti í strembanini at menna Sosialin og í tí sambandi eisini at dyrka aðrar møguleikar fyri samskifi og miðlan, sum seinastu árini eru vornir so mangir og fjølbroyttir.

Barnaheimið var á Landavegnum, og tíðindi og miðlar og tað at leggja til rættis og at skipa fyri vóru heilt tíðliga eyðkendir eginleikar.

Jan er havnarmaður. Mamman er Mia fødd Hansen og av Funningsstovuslagnum, og pápin var Eiden Müller, sum mundi vera ein av teimum fyrstu føroyingunum við journalistútbúgving. Hann lærdi á Politiken og arbeiddi í mong ár á Dimmalætting, áðrenn hann fór at arbeiða fyri seg sjálvan og skrivaði fyri fleiri útlendsk bløð og tíðindastovur.

Mamma Eiden, Ebba, var úr Slagelse. Zahle, sum var framstandandi radikalur politikari og forsætismálaráðharri, var pápabeiggi hennara. Ebba var gift H. C. Müller, sum var útbúgvin juristur og vinnulívsmaður í Havnini. Hann doyði blaðungur, og Ebba rak síðani virksemið, eitt nú sum DFDS umboð og eitt skifti sum formaður í Reiðarafelagnum.

Mia og Eiden fingu tríggjar synir: Frank, Jan og Michael sum allir búgva í høvuðsstaðnum.

Áhugin fyri samfelagsviðurskiftum í breiðum týdningi var góður íblástur hjá Jan til journalistikkin. Útbúgvingarliga gjørdi hann ein umveg, sum helst hevur verið hentur í lívsstarvinum. Eftir málsligt studentsprógv í Hoydølum fór Jan í 1971 niður til Keypmannahavnar, har hann fór undir lestur í fornaldarfrøði og samfelagsfrøði. Steðgurin var kortini ikki langur, og í 1972 var hann millum teirra, sum fóru undir spildurnýggja støðisútbúgving í náttúruvísind á Fróðskaparsetrinum.

Tíðliga í tíðini skrivaði Jan um ítrótt og ungdómsviðurskifti í Dagblaðnum, og tað sigst, at tað varð heitt á hann um har at taka størri ábyrgd á seg. Jan vildi tó fegin útbúgva seg meiri. Hann fór á journalistskúlan í Århus í 1974, og tá ið hann leyk prógv fýra ár seinni, hevði hann verið í praktikk í eitt hálvt ár í útvarpinum og í eitt ár á Sosialinum.

Sosialurin gjørdist lívsverkið hjá Jan. Fyrstu árini arbeiddi hann saman við Torfinni Smith, síðani saman við Kristjani Dahl, sála, og so komu fleiri yngri uppí og vóru við at bera víðari.

Fyrstu árini var tað í trongum umstøðum í Sjúrðargøtu. At flyta út á Argir mundi kennast sum risa betring av karmunum, og tá ið Sosialurin so flutti heim í Vágsbotn, segði Jan seg kenna møguleikarnar at vera margfaldar, og hann hevur staðið á odda í fleiri nýskapanum .

Spurningurin hjá flokspolitisku bløðunum var meiri nær, enn um lykilin skuldi snarast um. Meðan hini bløðini fóru, so eydnaðist tað Jan og feløgum hansara at menna Sosialin. Pressa varð sett í kjallaran á Argjum, útgávurnar fjølgaðust frá tveimum til tríggjar og síðani fimm ferðir um vikuna, og tað eydnaðist eisini at gera gamla dreymin til veruleika um at keypa blaðið frá Javnaðarflokkinum.

Samstundis sum karmarnir vórðu víðkaðir og rúmkaðir, so megnaði Jan við sínum stóra hugflogi og arbeiðssemi at stríðast fyri journalistkum dreymum og málum:

Sosialurin setti tíðliga professionellan fotograf, hann so at siga uppfann Óla Petersen sum blaðteknara síðst í áttatiárunum, og teir á Argjum mundu vera millum teir fyrstu í kongaríkinum at bjóða internettænastur. At gera blaðið sjónligt stríddist Jan fyri við fyrst at seta redaktiónir kring landið, síðani við rullandi redaktiónini og so komu Portalurin og Rás2.

Tað hevur altíð verið soltið við útbúnum journalistum. Tí hevur verið neyðugt við ungum og hugagóðum fólkum. Jan hevur givið ungum spírum kjans at royna seg, og tey eru nógv, sum minnast aftur á læruríkt tíðarskeið saman við Jan Müller.

Tað er tiltikið at vera á redaktiónsfundi saman við Jan. Hugskotini og vinklarnir eru sum mjølið í krukkuni á sinni. At netverkið hjá fryntliga og eldhugaða Mülleranum hevur verið so ógvuliga stórt og víðfevnt er